

# Statoil funnið gass á nýggjari leið

Jan Müller

20.03.2014 - 13:20

Oljan.fo

Norska Statoil hevur funnið gass á Visund-økinum, sum er har norðuri í Norðsjónum.

Í tíðindaskrivi frá oljustýrinum stendur, at fundið er millum 500 milliónir og tvær milliardir rúmmetrar av gassi. Sambært Statoil svarar hetta til 43 prosent av tí, sum felagið væntar at finna í tí norðara partinum av Visund-økinum.

Metingin er, at tað ber til at vinna 29 milliónir tunnur í norðara parti av Visund og 67 milliónir tunnur í tí syðra partinum. Tað nýggja fundið er nakað minni enn tað gassfundið, sum Statoil fann á Johan Castberg-leiðini í Barentshavinum í síðsta mánað.

Dýpið á Visund-leiðini er knappar 380 metrar, og brunnurin varð boraður 3.187 metrar.

Statoil er fyristøðufelag á Visund-leiðini. Hini feløgini í loyvinum eru Petoro, ConocoPhilips og Total E&P.